Skeiðsdepilin við Marknagil – SDM

TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

# Skeið í Inventor – grundskeið

## 17., 18., 19. og 20. feb. 2003 kl. 16.00-22.00

**Innihald:**
Talan er um eina innleiðslu til forritið og nýtsluflatuna.

Tá ið hetta er gjørt, verður farið ígjøgnum, hvussu tað ber til at dána slíkt sum
- Extrude – Revolve
- Loft – Sweep
- Sharing Sketches – Work drøg

Vit gera avmyndanir til eina framleiðslutekning úr tilfarinum.
Farið verður ígjøgnum, hvussu avmyndanir, skurður og endamál verða gjørd, og hvussu m.a. rammur verða settar inn og fyltar út. Eisini verður farið ígjøgnum, hvussu vit prenta og plotta.

Skeiðsluttakarin fær eisini nakað av vita um hjálpifunktiónir í Design Doctor Support skipanini, ON-line hjálp og fær at vita um Design Doctor Support skipanina, ið hjálpir og vísir, hvussu ein konstruktión kann byggjast upp og møguligar villur í henni bøtast. Nortið verður eisini við Assembly Modelling Fundamentals og »eksploderaðar« tekningar. Vit hyggja eisini at m.a. 3D Constraining, og hvussu vit gera og goyma arbeiðir.

**Skeiðleiðari:** Jacob Frederiksen frá CD-Light, DK
**Kostnaður:** 3.500,00 kr. íroknað frálæru, tilfar og mat.
**Stað:** Tekniski Skúli, 1. fyrsta hædd í El-deildini, Smiðjugerði
**Tilmelding:** **áðrenn 13. februar 2003**

**Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum. Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.**

Umsóknarbløð til Yrkisdepilin og Vitan fáast frá Skeiðsdeplinum.

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374
t-postur dt@hsh.fo

---

# Chrysler Grand Voyager

Persónbilur, árg. '97. Sportfelgur, nýlakeraður.
Til sølu fyri 150.000 kr.

**Tlf. 221176**

---

Skeiðsdepilin við Marknagil – SDM

TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

# Inventor – víðkað skeið

## 21. feb. 2003 kl. 16-22
## 22. og 23. feb. 2003 kl. 09-17

**Innihald:**
Skeiðsluttakarin fær meira at vita um forritið, og hvussu full nytta kann fáast burtur úr tí. Vit hyggja at projektfílum, designaraeindum, og hvar rammur verða settar. Nortið verður við reservatión av myndum (multi user), sum eisini fevnir um Design Assistant/Manager. Hugt verður at, hvussu vit fáa nýtt Excel saman við Inventor Advanced. Eisini verður hugt at, hvussu onnur format kunnu flytast ímillum.

Vit fara ígjøgnum grundleggjandi funktiónirnar eins og Flange, Face, Bend, Cut, Corner seam og Corner. Luttakarin fær eisini kunning um at gera 2D avmyndanir til eina framleiðslutekning.

**Skeiðleiðari:** Jacob Frederiksen frá CD-Light, DK
**Kostnaður:** 3.500,00 kr. íroknað frálæru, tilfar og mat.
**Stað:** Tekniski Skúli, 1. fyrsta hædd í El-deildini, Smiðjugerði
**Tilmelding:** **áðrenn 13. februar 2003**

**Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum. Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.**

Umsóknarbløð til Yrkisdepilin og Vitan fáast frá Skeiðsdeplinum.

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374
t-postur dt@hsh.fo

---

# Ársaðalfundur

verður í Sands skúla 23. febr. 2003 kl. 15.00.
Skrá sambært lógum felagsins.

**Sandoyar Sýslu Ferðalag**

---

# Til Sølu

## Grundøki í Klaksvík

Grundøki Garðavegur 5, stórt 500 $m^2$, liggur sera væl fyri mitt í býnum, til sølu til hægstbjóðandi.

**Tlf. 45 76 55 ella 21 73 55**

---

<ph_1>
<ph_1>
<ph_1>
<ph_1>

---

# Skrivstovufólk

## til kommunuskrivstovuna

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Runavíkar Kommunu at arbeiða hálva tíð.

Arbeiðið umfatar alt vanligt skrivstovuarbeiði

Umsøkjarin skal hava royndir í skrivstovuyrkinum.

Starvið verður at seta 1. mars ella eftir nærri avtalu.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til Kommunuskrivstovuna á tlf. 41 70 00.

Skrivlig umsókn, saman við upplýsing um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli, skal verða Runavíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi 21.02.2003.

# Skrivstovufólk

## til Runavíkar Kommunuskúla

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Runavíkar Kommunuskúla at arbeiða hálva tíð.

Arbeiðið umfatar alt vanligt skrivstovuarbeiði.

Umsøkjarin skal hava royndir í skrivstovuyrkinum, duga væl føroyskt og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Starvið verður at seta 1. mars ella eftir nærri avtalu.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til skúlastjóran Ásmund Lamhauge á tlf. 44 73 31.

Skrivlig umsókn, saman við upplýsing um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli, skal verða Runavíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi 21.02.2003.



**Runavíkar kommuna**
Heiðavegur · 600 Saltangará

---

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

# Aðalfundur

**Aðalfundur felagsins verður 12. februar 2003 kl. 19.30**

Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J.H.Schrøtersgøta 9.

Dagsskrá:
1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing frá stjórnini frá farna árið
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi
4. Val av formanni
5. Val av tveimum stjórnarlimum
6. Val av tveimum tiltakslimum
7. Val av tveimum grannskoðarum
8. Áseting av limagjaldi
9. Uppskot frá nevndinium lógarbroyting
10. Ymiskt

**Nevndin**

---



Skeiðsdepilin við Marknagil – SDM

TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

# Workshops

## í samstarv við FloodRoocks A/S úr Noregi
## Hvussu økja vit um effektivitetin á arbeiðsplássinum

**Workshop I 18. februar kl. 13.00-18.00**
**kostnaður 1.980,- kr.**

**Hækka effektivitetin við at skilja teg sjálvan og tíni starvsfólk betur**
- analysera egnan framferðarhátt
- lær at kennast við framferðarhættir hjá øðrum og at laga teg til teir

**Workshop II 19. februar kl. 13.00-18.00**
**kostnaður 980,- kr.**

**Nýt tína tíð meira effektivt**
- tíðarætlan og tíðarnýtsla
- málsetningur
- raðfesting
- analysering
- optimering av fundum
- at arbeiða í toymi

**Workshop III 20. februar kl. 13.00-18.00**
**kostnaður 980,- kr.**

**Hægri effektivitetur, tá broytingar verða framdar**
- gjøgnumgongd av nýskapanar profilum
- egnar sterkar og veikar síður í broytingar- og nýskaparumstøðum

**Málbólkur: Rakstrar- og starvsfólkaleiðarar**
**Tilmelding: Áðrenn 13. februar 2002**

Nærri fæst at vita um innihald við at venda sær til

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374
t-postur dt-sth@hsh.fo

---

# Koyrikort til persónbil

Nýtt skeið byrjar mánadagin 10. februar kl. 17.30.

Tilmelding á tlf. 31 88 21 ella 21 87 77.

**Sp/f Koyrikortið**
v/ Hans J. Hermansen
Slættanesgøta 5

---

# Neytakjøt

Fjórðingar til sølu, frá kr. 25,- til kr. 28,- pr. kg.

Áhugað kunnu ringja **tlf. 254162, 254082 ella 311292**

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3349, Sp/f Vestcon, 660 Søldarfjørður.

**Viðtøkur broyttar:** 08.01.2003.
**Nýggj adressa**: 620 Runavík
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Jákup Zacharias Müller Davidsen, 625 Glyvrar.
**Innkomin í nevndina:** Johannes Johannesen, 640 Rituvík.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka og eiga fasta ogn, reka entreprenørvirksemi, flutning, handil, ídnað og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 6. februar 2003*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1817, Sp/f Bilfríðkan, 100 Tórshavn.

**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri**: Ludvík Pedersen, Gæsugøta 9, 100 Tórshavn.
**Innkomin sum stjóri:** Suni David Magnussen, Blankagøta 15, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 6. februar 2003*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2730, P/F Inni, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini**: Dániaal Birgir Joensen, Birnugøta 5, 100 Tórshavn.
**Innkomin í nevndina:** Øssur Skeel Nolsøe, Brattalíð 23, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 6. februar 2003*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2374, P/F Driftin, 510 Gøta.

Viðtikið 20.12.2002 at lækka partapeningin við kr. 450.000,00 til kr. 2.180.000,00 at seta í grunn eftir at proklama er runnin.

*Skráseting Føroya tann 6. februar 2003*
*Kristin Balle*

---

FAMILJU- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

# Løgfrøðingar til Familju- og heilsumálaráðið

Lýst verður eftir einum løgfrøðingi til setan í Familju- og heilsumálaráðnum skjótast til ber. Talan er um eitt fast starv.

**Sum løgfrøðingur í Familju- og heilsumálaráðnum verða uppgávur tínar millum annað,** at tilevna lógaruppskot og uppskot til kunngerðir á familju- og heilsuøkinum, at svara fyrispurningum frá løgtinginum við løgfrøðiligum innihaldi, tulka lógir og reglur fyri stovnar undir Familju- og heilsumálaráðnum, gera upprit til landsstýrisfundir og avgreiða klagur.

Tey lógarøki, sum tú skalt arbeiða við at menna í samstarvi við onnur, eru familjuøkið, heilsuøkið og íbúðarøkið.

**Førleikakrøv:**
Tú hevur løgfrøðiligt embætisprógv. Umsøkjarar, ið skriva løgfrøðisligt serritgerð, verða eisini góðtiknir.

Starvsroyndir frá miðfyrisitingini ella aðrar løgfrøðiligar starvsroyndir er ein fyrimunur. Harumframt hevur tú góð samstarvsevni og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

**Starvið sum løgfrøðingur í Familju- og heilsumálaráðnum** er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Starvið er sjálvstøðugt, og tú fært góðar møguleikar fyri skeiðum og framhaldandi eftirútbúgving.

Fyri framman standa nógvar stórar avbjóðingar viðvíkjandi lógarog kunngerðarsmíði á Familju- og heilsuøkinum. Arbeitt verður millum annað við nýggjari sjúkrahúslóg, alt økið viðvíkjandi viðgerð av sjúklingum uttanlanda skal endurskoðast, nýggj løggáva skal gerast viðvíkjandi sjúkrakassunum, og innan íbúðarøkið. Arbeitt verður eisini við at gera langtíðarætlanir innan fyribyrgingarøkið og at orðað ein heilsupolitik.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Familju- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

**Umsókn** við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

**Familju- og heilsumálaráðið**
Att.: Starvsfólkadeildin
Eirargarði 2
FO 100 Tórshavn

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. februar 2003, kl. 12:00. Setanarsamrøður verða væntandi í viku 7 og 8.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra ella Aibritt á Pløgv, aðalstjóra, tlf. 30 40 50.

---

Reparera bilar
Tryggingarskaðar
Upprætting og lakering

Alt mekaniskt arbeiði og styling til bilar

**Auto-Tek**
Argjaboðagøta 5 ·
Tlf. 321206 · Fax 321236
eftir kl. 17.00 á Tlf. 221006

www.sosialurin.fo

---

Giktafelag Føroya

# Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður á Tórshavnar Sjómansheimi 22. februar 2003 kl. 15.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

Eftir aðalfundin uml. kl. 16.00 verður fyrilestur við Hera Kragesten, sálarfrøðingi. Evni: »At liva við kroniskari sjúku«.

**Nevndin**